# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar



*18. juni fingu Jónbjørg Mortensen, Hvalba, og Hans Olaf Hentze, Trongisvági, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 2900 gr.*

7. mai fingu Sonja og Búi Petersen, Vanlover, Kanada, ein son. Hann vigaði 1855 gr og var 43,5 cm langur. Hann eitur Tóbin Max Boon-Petersen.

5. juni fingu Elisabeth og Svein Eliasen, Hvalba, ein soin. Hann var 54 cm langur og vigaði 4450 gr.

10. juni fingu Annie og Heri Hentze, Trongisvági, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3910 gr.

17. juni fingu Anna Louisa og Steffan Gaard, Skálafirði, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3325 gr.

18. juni fingu Anja Hentze og Fróði Sørensen, Saltangará, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3250 gr.

18. juni fingu Britt og Magni Johannesen, Tórshavn, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 2665 gr.

18. juni fingu Sólgerð Viderø, Tórshavn, og Jørn Ellingsen, Reipå, Noreg, ein son. Hann var 49 cm langur og vigaði 2790 gr.

19. juni fingu Maja Jensen og Per Debes, Skovlunde, ein son. Hann var 49 cm langur og vigaði 2930 gr.

19. juni fingu Fía Ellingsgaard og Jóhan Fossdalsá, Nesi, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 3750 gr.

20. juni fingu Lilian Hellisdal og Áki Hansen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3700 gr.

20. juni fingu Evelyn Gaard og Pauli Magnussen, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 57 cm long og vigaði 4700 gr.

20. juni fingu Maja og Leif Joensen, Viðareiði, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 2950 gr.

## Dagurin

**25. juni. Prosper**. Halgimenni úr Fraklandi, sum teir annars vita lítið um at siga uttan tað, at hann var høgt mettur kirkjulærari í fornkirkjuni og doyði í 455. Navnið merkir *hin eydnuríki.*

**26. juni. Pelagius**, deyður umleið ár 925. Ein 10 ár gamaldrongur, sum varð tikin av døgum, tá ið maurar ráddu í Spania.

**27. juni. Sjey sovarar.** Halgisøgan sigur frá, at tá ið keisarin Decius legði eftir teimum kristnu, leitaðu sjey ungir menn sær skjól í einum helli í fjøllunum. Hellið, teir krógvaðu seg í, varð funnið, og stórir steinar settir fyri inngongdina, so at teir skuldu svølta í hel.

200 ella 300 ár seinni vórðu steinarnir tilvild veltir frá munnanum, og teir sjey vaknaðu við sítt frísku lív uttan at vita, hvussu leingi teir høvdu sovið.

## 90 ár

27. juni verður Signy Nordenskjold, Vágur, 90 ár. Dagurin verður hildin í heiminum frá kl.14.00 til 19.00.

## 85 ár

Leygardagin 25. juni verður Pætur Joensen í Nýggjustovu við Gjógv 85 ár. Dagurin verður hildin á Gjáargarði sunnudagin 26. juni frá kl. 17.00.

Leygardagin 25. juni verður Sanna Johannessen í Æðuvík 85 ár. Tey, ið vilja heilsa upp á Sonnu, eru vælkomin í Sjókafeina í Runavík leygardagin millum kl. 16.00 og 21.00.

Mánadagin 27. juni fyllir Davina Mikkelsen, Toftum, 85 ár. Dagurin verður hildin á eldrasambýlinum Vesturskin.

## 80 ár

Týsdagin 28. juni verður Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, 80 ár. Føðingardagin heldur hann í Danmark. Adr. er: Nørupvej 28, 2610 Rødovre.

## 75 ár

Sunnudagin 26. juni fyllir Hjalmar Joensen í Fuglafirði 75 ár. Føðingardagurin verður hildin í Lonini frá kl. 16.00 til 22.00.

Sunnudagin 26. juni verður Elinborg Húsgarð í Syðrugøtu, 75 ár. Hon er burturstødd føðingardagin.

## 60 ár

Leygardagin 25. juni verður Marner Tjørnudal, Signabøur, 60 ár. Dagurin verður hildin heima við morgunmati millum kl. 10.00 og 15.00. Øll eru vælkomin.

## Prógv

Ámundur Nielsen, Strondum, hevur 20. juni á Ingeniørhøjskolen í Århus lokið prógv sum veikstreymsverkfrøðingur.

Torgun Davidsen, Tórshavn, hevur 13. juni fingið prógv sum Ejendomsmægler, á Handelsgymnasiet Mariager Fjord. Torgun hevur frammanundan bankaútbúgving og starvast dagliga sum kundaráðgevið í Føroya Banka, í Tórshavn.

Havnar leksikon:

# Fyrsti bygningur bygdur úr reyðum múrsteini





Í 1934 var múrsteinsbygningurin hjá "as. Balslev & Coos" á Eystaru bryggju í bygdur. Bygningurin bleiv bruktur til heilsølu og skrivstovur hjá fyritøkuni.

Tað var danska múrarafyritøkan "Larsen & Steenstrup" í Keypmannahavn sum bygdi bygningin, sum H.C.W. Tórgarð arkitektur teknaði.

Talan var um tey fyrstu húsini í Føroyum, ið vórðu bygd úr reyðum múrsteini.

15. mars 1969 gevst Balslev við heilsøluvirkseminum. Sama dag yvirtaka Kartni Winther, Torbjørn Sørensen og Poul Michelsen heilsøluna undir navninum Kartni Winther & Co. Bygningurin bleiv tikin niður í 1983/84.

Innsettu myndirnar eru av H.C.W. Tórgarð arkitekti, og av tá húsini vóru reist í 1934.

Um onkur av lesarum okkara veit meira um hesar myndirnar, eru hann ella hon vælkomin at seta seg í samband við Birgar Johannessen á tel. 214647 ella 314647.